

# Málsviðgeri

Á sosialu deild í Tórshavnar kommunu er eitt farloyvisstarv sum málsviðgeri/skrivari hjá barnaverndartænastuni leyst at søkja til setan skjótast gjørligt og fram til 15. august 2008.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar. Umframt at vera skrivari hjá sosialráðgevunum eru uppgávurnar m.a.

- Móttøka og skráseting av innkomnum posti
- Fyrireika dagskrá til barnaverndarfundir.
- Avgreiða nevndarsamtyktir
- Umsita lønarútgjaldingar til m.a. fosturforeldur.

**Útbúgving/royndir**
Viðkomandi útbúgving og fyrisitingarligar royndir.
Kunnleika til EDV á brúkarastøði.
Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.
Skal vera røkin, framsøkin og duga at samskifta.

**Kommunan bjóðar**
áhugavert starv við fjølbroyttum uppgávum í einum mennandi fakligum umhvørvi.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er normerað í 3. lønarflokki sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, deildarleiðara, ella Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra, tlf. 30 20 10.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir, skal verða Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 28. september 2007.

**Tórshavnar kommuna**

# SØLUFÓLK

Søkt verður eftir einum sølufólki til Farpack. Vit síggja fyri okkum ein reiðiligan og fyrikomandi persón, ið hevur góð samstarvsevnir, arbeiðir miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult.

Talan er um eitt spennandi starv, har tú hevur nógv við fólk at gera. Tú vitjar kundar og fæst við innkeyp, sølu og flutning av okkara vørum.

Løn og setanartreytir vera samsvarandi útbúgving og royndum.

Skrivlig umsókn kann sendast til okkum innan 5.oktober 2007.

Nærri upplýsningar kunnu fáast við at venda sær til Eyðun Olsen á tlf 353008 / 219898 ella á e-mail eydun@farpack.fo

---

**Farpack** hevur skrivstovu og goymslu á Smyrilsvegi 5 í Tórshavn. Vit útvega eitt stórt úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp, plast, klæðum og øðrum vørum til øll vinnuøkir.

Fiskavirkir og fiskiskip eru millum okkara stóru kundar. Vørurnar vera fyri tað mesta innfluttar úr Norðurlondum og úr øðrum londum. Farpack er ISO 9001:2000 góðkent av Det Norske Veritas og lýkur altjóða krøv til keyp, marknaðarføring, sølu og flutning av pakningi og øðrum vørum til fiskivinnu og annan ídna.

**FARPACK**

Smyrilsvegur 5 · Postboks 3099
FO-110 Tórshavn · Tlf. 353000 · Fax 353010
farpack@farpack.fo · www.farpack.fo

# SANDS KOMMUNA

Mørkin Mikla 3
FO - 210 Sandur
Tel.: 361 034
Fax: 361 734
kom_sand@post.olivant.fo

**Broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Sands Kommunu**

Sambært § 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum verður við hesum gjørt kunnugt, at Kommunustýrið á Sandi, á fundi 26/2-2007 samtykti broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Sands Kommunu.

Ætlaða broytingin er, at alt økið D1, almennir stovnar, Uppi á Vatnsryggi, matr.nr. 226a og 15c, verður øki B, sethúsaendamál.

Broytingin fevnir um: 16053 m² av matr.nr. 226a, og 1249 m² av matr.nr. 15c, Sandur.

Tilfar, sum lýsir broytingina, liggur frammi á kommunuskrivstovuni frá 20/9-2007 og til 20/10-2007 í vanligari avgreiðslutíð.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at lata Sands Kommunu skrivliga í seinasta lagi 20/12-2007.

Sands Kommuna

# Koyri-kort?

Teoriskeið til persónbil byrjar týsdagin 25. september kl. 17.00

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

Stanley A. Olsen
tel 211099

Jekaragøta 10 • Tórshavn

# Merlot søkir eftir



## Kokki

*Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi, fjølbroyttum og avbjóðandi umhvørvi, er tað júst tær vit hava brúk fyri.*

*Nærri upplýsingar fáast við at ringja til 214121*

RESTAURANT MERLOT
Magnus Heinasonargøta 20
FO-100 Tórshavn
Tel (+298) 311121 - Mobile (+298) 214121

Sjónband 317774

Lesið Sosialin -so eru tit við!